# EINGIN IVI UM GLYVURSNES



**FLOGVØLLUR** Fleiri høvdu longu gitt tað. Teir sakkønu hava longu sagt tað. Johan Dahl, landsstýrismaður í flogvallarmálum, visti tað. Og nú hevur ein kanning staðfest tað. Glyvursnes er best egnaða stað til framtíðar flogvøll. Men løgtingið hevur kortini skotið henda møguleikan langt út í framtíðina

## Nýggjur flogvøllur á Glyvurnesi um 10 ár

Poul Michelsen krevur nú, at teir politikarar, sum trumfaðu Løgtingið til at longja ein óbrúkiligan flogvøll í Vágum, nú eisini gera eina miðvísa raðfesting, so at vit fáa nýggjan flogvøll á Glyvursnesi um 10-12 ár

- Vit skulu hava ein nýggjan flogvøll á Glyvursnesi um 10-12 ár.

Tað er ein málsetningur, sum Poul Michelsen, løgtingsmaður, nú krevur, at Løgtingið setir sær.

Tí krevur hann, at Løgtingið nú beinanvegin fer undir at fyrireika bygg-ingina av einum nýggjum flogvølli á Glyvursnesi.

Hann sigur, úrslitið av tí, sum er hent í flogvallarmálinum síðstu vikurnar, kann ikki vera øðrvísi.

- Teir politikarar, sum trumfaðu Løgtingið til at brúka 365 milliónir til at lappa upp á ein óbrúkiligan vøll í Vágum, skylda nú Føroyska samfelagnum, at teir beinanvegin bøta um skaðan og beinanvegin fara undir arbeiðið at gera nýggjan vøll á Glyvursnesi.

- Nú hava teir fingið sítt og nú krevja vit eisini av teimum, at teir eisini beinanvegin fara í holt við arbeiðið at gera ein altjóða flogvøll, sum eitt oyggjasamfelag, sum okkara, krevur.

Poul Michelsen heldur, at hetta eigur ikki at vera eitt krav til sjálva samgonguna, men til allar flokkar á tingið, sum trumfaðu útbyggingina í Vágum ígjøgnum.

Hann sigur, at tí er neyðugt at gera eina íløguætlan, sum raðfestir flogvøllin á Glyvursnesi fremst og so mugu vit finna útav, hvussu hann skal fíggjast.

*-aki*

Rógvi Nybo

Í gjár lat Landsverk nýtt bensin á »bálið« um framtíðar flogvøll í Føroyum. Kanningin av hvar ein framtíðar flogvøllur í Føroyum liggur best, sum summir løgtingsmenn kravdu at kenna úrslitið av, áðrenn teir tóku støðu til, um útbyggjast skuldi í Vágum, varð løgd fram.

Hetta er ein kanning, sum kundi hava avgerandi týdning fyri, hvussu raðfestast skuldi við framtíðar útbygging av infrakervinum í Føroyum.

Tá kanningin varð løgd fram, var eingin ivi um niðurstøðuna. Glyvursnes er nógv best egnaða stað í Føroyum at leggja ein flogvøll.

Í kanningini verður staðfest, at tá tað kemur til lendi rundanum og til veðurlagið á staðnum, er Glyvursnes eitt rættiliga vælegnað flogvall-arpláss.

Frítt er til veggja, og einki bendir á, at veður er ein trupulleiki á staðnum. Gamaní er javnan mjørki á Glyvursnesi, men hesum er eisini tikin hædd fyri. Tí á Glyvursnesi er nevniliga gjørligt at byggja ein kategori 2-flogvøll, um hetta er ynskið, og saman við nýmótans út-



gerðini, sum setast skal upp í samband við eina slíka nýggja flogvallarbygging, verður ikki ein avlýsing á Glyvursnesi orsaka av mjørka.

Hetta staðfesti ein royndur flogskipari, Olaf Poulsen, sum var til staðar tá kanningin varð løgd fram, eisini.

Tilsamans kann ein framtíðar flogvøllur á Glyvursnesi betra um reglusemið á flogferðsluni við í minsta lagi fýra prosentum er niður-støðan, í mun til flogvøllin í Vágum, sum hevur 83 prosent reglusemi, sambært kanningini hjá Landsverki. Verður ein sokallaður kategori 2-flogvøllur bygdur á Glyvursnesi, er talan helst um eina betring á nógv meira enn hesi fýra prosentini.

Kostnaðarmetingin hjá Landsverki, sum er frá 2006, sigur, at ein vøllur upp á 2700 metrar kann gerast á Glyvursnesi fyri umleið 1,7 milliard krónur.

### Einki nýtt undir sólini

Maðurin við valdinum á økinum, landsstýrismaðurin í flogvallarmálum, Johan Dahl, var tó lítið áhugaður í kanningini, tá hon í gjár varð løgd fram. Í øllum førum ómakaði hann sær ikki eingong at møta upp, tá kanningin varð løgd fram.

Tá Rás2 í gjár hevði fatur á honum kundi hann bert staðfesta, at meginparturin av tí, sum stóð í kanningini – og sum bíðað hevur verið eftir í spenningi til í gjár, og sum hevur verið dult sum mansmorð – visti hann longu frammanundan. Uttan veðurkanningarnar, sum hann fekk bagatelliserað til einki at hava uppá seg. Hann hevði longu í januar í fjør fingið hesar upplýsingar frá Landsverki, við kostnaðarmetingum og øllum.

- Her er einki nýtt undir sólini, staðfesti Johan Dahl, landsstýrismaður í flogvall-armálum.

Stóri spurningurn er so, hví fleiri tingmenn, eitt nú Sjúrður Skaale úr Tjóðveldi, John Johannesen úr Javnaðarflokkinum og Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum, sum saman við Bjarna Djurholm hava verið hart ímóti at byggja fult út